**Samandráttur av fundarsamtykt hjá Hvalbiar Kommunu tann 10. oktober 2012**

Møtt: Niels Olaf Eyvindsson, Trygvi Midjord, Martin í Nesi, Herdis Jensen

Rúni Thomsen, Niels J. Thomsen.

Otto West hevði forfall.

| | |
|---|---|
| **Mál 1:**<br>**Umsókn um stuðul frá Barnabata til "Tú og Eg Ráðgevingina".** | Til 1:<br>Samtykt varð ikki at stuðla. |
| **Mál 2:**<br>**Umsókn um stuðul frá Lions Club Suðuroy.** | Til 2:<br>Samtykt varð at stuðla við at keypa 170 jóla-kalendarar, har meginparturin av ágóðanum fer til tiltakið "Í menniskjum góður tokki". |
| **Mál 3:**<br>**Umsókn um stuðul til Sjúklingahotellið Tórshavn.** | Til 3:<br>Samtykt varð at stuðla við kr. 10.000,-. |
| **Mál 4:**<br>**Val av føstum og varalimi til kommunuval-nevndina í Hvalba.** | Til 4:<br>Samtykt varð at velja Súsonnu Niclasen sum fastan lim fyri Hjørleif Thomsen og Ingibjørg Vestergaard sum varalim fyri Nitu Næs. (Hjørleif og Nita hava boðað frá, at tey taka seg úr valnevndini). |
| **Mál 5:**<br>**Skriv frá Umhvørvisstovuni í sambandi við nýggja fotoflúgving í 2013.** | Til 5:<br>Samtykt varð at taka lut í hesum, tá komm-unan er áhugað í nýggjum flogmyndum. |
| **Mál 6:**<br>**Umsókn um gøtuljós.** | Til 6:<br>Samtykt varð, at Tekniska nevnd fer á staðið at kanna umstøðurnar. |
| **Mál 7:**<br>**Umsókn um asfaltering.** | Til 7:<br>Samtykt varð, at Vega- og havnanevndin kannar málið. |
| **Mál 8:**<br>**Fyrsta viðgerð av fíggjarlógini fyri 2013.** | Til 8:<br>Útreiðslurnar til rakstur eru mettar til uml. |

| | |
|---|---|
| | kr. 16.900.000,-. Samtykt varð, at skattapros-<br>entið framhaldandi verður 20%. |
| **Mál 9:**<br>**Umsókn frá Royn um stuðul til serstakt tiltak.** | Til 9:<br>Í sambandi við at Royn ætlar at skipa fyri<br>víkingadøgum komandi summar, verður søkt<br>um stuðul. Samtykt varð at játta kr. 50.000,-<br>í ár til fyrireikingar. |
| **Mál 10:**<br>**Skriv frá TAKS í sambandi við umsókn um**<br>**skattafrælsi frá bygdafelagnum á Rananum.** | Til 10:<br>Samtykt varð at viðmæla hesum. |